Kunngerðablaðið A
2011 Hefti 37
ISSN 0907-905X

Nr. 127 23. september 2011

# Eykajáttanarløgtingslóg

# fyri

# september 2011-2

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 11 Heilsumál**

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 8.000 | 8.000 | - |
| **Heilsumál** | | **8.000** | **-** |
| 11.20.3. Sjúkrahúsverkið v.m. | | 8.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **11.20.3. Sjúkrahúsverkið v.m.** | | | |
| 20. Serviðgerð uttanlands (Rakstrarj.) | J | 129.922 | - |
| | **EYJ** | **8.000** | - |

## C. Átekning

**Nr. 17. Høvuðskonta 11.20.3.20. Serviðgerð uttanlands *(Rakstrarjáttan)***
Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalu um fráflyting ella at siga upp galdandi leigusáttmála fyri sjúklingahotell í Tåsingegade í Keypmannahavn. Heimildin fevnir eisini um tær útreiðslur, sum ein avtala um fráflyting í úrtíð ella uppsøgn av leigusáttmála hevur við sær.

Tórshavn, 23. september 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 72/2011

Nr. 128 26. september 2011

**Løgtingslóg**
**um**
**heimildir landsstýrismansins viðvíkjandi kapitalviðurskiftunum í P/F Smyril Line**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at viðvirka til at umskipa kapitalviðurskiftini í P/F Smyril Line, heruppi í

1) at niðurskriva verandi partapening hjá landinum, samstundis sum aðrir íleggjarar tekna nýggjan partapening,
2) at sleppa kravinum um, at landið skal velja meirilutan av nevndini, og
3) at sleppa kravinum um, at landið skal hava atkvøðurættin fyri tey partabrøvini í P/F Smyril Line, sum Framtaksgrunnurin fekk við umleggingini av ábyrgdarláninum.

**§ 2.** Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Tórshavn, 26. september 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 76/2011

Nr. 129 26. september 2011

## Kunngerð um broyting í kunngerð um umsiting av landsjørð

### § 1

Í kunngerð nr. 95 frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð verða gjørdar hesar broytingar:

1) Inngangurin verður broyttur til:
„Við heimild í § 2, stk. 5, § 4, stk. 1 og 8, § 5, stk. 1, § 6, stk. 1 og 4, § 7, stk. 1, § 10, stk. 1 og § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð verður ásett.“

2) § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Festi kann bert verða lagt saman við øðrum festi, sum er í somu markatalsbygd ella við einum í grannalagnum, og bert, um samanleggingin førir til betri rakstur.“

3) § 4, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Undantak frá bústaðarskylduni kann eisini verða veitt, um umsøkjarin fer av oynni í arbeiðs- ella útbúgvingarørindum, ella orsakað av øðrum persónligum ávum má av oynni í eitt avmarkað tíðarskeið. Búnaðarstovan skal góðkenna orsøkir og tíðarskeið.“

4) § 11 verður orðað soleiðis:
„**§ 11.** Fyri sølu av jørð, makaskifti, marknaumskipan, servitutstriking, festaraskifti og sáttmálar verða ásett hesi gjøld:

1) Fyri sølu, makaskifti, marknaumskipan, servitutstriking av grundstykkjum av vanligari støðd kr. 2.000,-
2) Fyri sølu, makaskifti, marknaumskipan, servitutstriking av størri øki 1½% av keypsprísinum, tó í minsta lagi kr. 2.000,-
3) Makaskifti kr. 2.000,-
4) Marknaumskipan kr. 900,-
5) Servitutstriking, átekning skeytir kr. 900,-
6) Býarhegn/vetrarfriðing kr. 5.000,-
7) Festaraskifti kr. 3.000,-
8) Leigusáttmálar og ískoytir til leigusáttmálar kr. 1.000,-
9) Leingjan av leigusáttmála hjá sama leigara kr. 500,-
10) Traðarleiga kr. 500,- um árið
11) Leiga av neystagrund kr. 100,- um árið
12) Leiga av lítlum óinngirðaðum lendi til mastrar og antennur kr. 500,-
13) Leiga av størri lendi til størri anlegg, so sum vindmyllur, aling o.a. kr. 3,44 pr. m2 (2008 prístalið), tó ikki minni enn kr. 5.700,- um árið (2008 prístalið)
14) Onnur leiga av lendi í styttri áramál kr. 5.700,-“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 26. september 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 130 26. september 2011

# Kunngerð um avreiðing av livur og treytir fyri tillutan av eyka fiskidøgum

Við heimild í § 29, stk. 10 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, við seinni broytingum, verður ásett:

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um avreiðing av livur til virkingar í Føroyum frá fiskiførum í høvuðsbólkunum 2, 3 og 4, sbrt. § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, og treytir fyri at fáa lut í eyka fiskidøgum í hesum sambandi.

**§ 2.** Í fiskiárinum 2011/2012 eru, fyri høvuðsbólkarnar 2, 3 og 4, tillutaðir ávikavist 127, 79 og 125 fiskidagar tilsamans millum tey fiskifør, sum avreiða livur.
*Stk. 2.* Fiskifar í høvuðsbólki 2, trolarar, kann fáa 6 fiskidagar fyri tey fyrstu 10 tonsini av livur, sum verða avreidd. Fyri hvørji 4 tons, sum síðani verða avreidd, verða 2 eyka fiskidagar tillutaðir.
*Stk. 3.* Fiskifar í høvuðsbólki 3, línuskip, kann fáa 6 fiskidagar fyri tey fyrstu 5 tonsini av livur, sum verða avreidd. Fyri hvørji 3 tons, sum síðani verða avreidd, verða 2 eyka fiskidagar tillutaðir.
*Stk. 4.* Fiskifar í høvuðsbólki 4, útróðrarbátar yvir 15 tons, kann fáa 5 fiskidagar fyri tey fyrstu 1,5 tonsini av livur, sum verða avreidd. Fyri hvørt tons, sum síðani verður avreitt, verða 2 eyka fiskidagar tillutaðir.
*Stk. 5.* Um fiskidagar eftir stk. 1 ikki eru brúktir fyri 1. juni 2012, kunnu teir brúkast samsvarandi § 3.

**§ 3.** Í fiskiárinum 2011/2012 eru, fyri høvuðsbólkarnar 2, 3 og 4, tillutaðir ávikavist 42, 26 og 42 fiskidagar eyka at brúka í sambandi við verkætlanir um gagnnýtslu av livur, ella til serligar avtalur millum virki og fiskifør, ið hava til endamáls at gagnnýta livur.
*Stk. 2.* Fiskimálaráðið skal góðkenna møguligar verkætlanir ella avtalur millum virki og skip.
*Stk. 3.* Eykadagar verða tillutaðir, eftir at Fiskimálaráðið hevur givið sína góðkenning sbrt. stk. 2, og tá ætlaðu nøgdirnar av livur eru avreiddar.
*Stk. 4.* Um fiskidagar eftir stk. 1 ikki eru brúktir fyri 1. juni 2012, kunnu teir brúkast samsvarandi § 2.

**§ 4.** Fiskidagar sbrt. §§ 2 og 3 verða lagdir afturat fiskiloyvinum hjá viðkomandi fiskifari, tá Fiskimálaráðið hevur fingið skjalprógv frá keypara fyri, at ásettu nøgdirnar av livur eru avreiddar til virkingar í Føroyum.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. september 2011. Kunngerðin fer úr gildi 31. august 2012.

Fiskimálaráðið, 26. september 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 131 26. september 2011

**Kunngerð um broyting í kunngerð um tíðaravmarkaðar friðingar av ávísum smáfiskaleiðum v.m.**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 94 frá 4. juli 2011 um tíðaravmarkaðar friðingar av ávísum smáfiskaleiðum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2 verður „Í tíðarskeiðinum 1. februar til 30. apríl, báðir dagar íroknaðir, er vinnuligur fiskiskapur við línu, kalvalína, gággulína og hemaraveiða undantikin, ikki loyvdur innan fyri linjur drignar millum hesi støð:“ broytt til: „Í tíðarskeiðinum 1. februar til 30. apríl, báðir dagar íroknaðir, er vinnuligur fiskiskapur við línu ikki loyvdur, kalvalína, gággulína og hemaraveiða undantikin, innan fyri linjur drignar millum hesi støð:“

2) Í § 3 verður „Í tíðarskeiðinum 1. mai til 31. januar, báðir dagar íroknaðir, er vinnuligur fiskiskapur við línu, kalvalína, gággulína og hemaraveiða undantikin, ikki loyvdur innan fyri linjur drignar millum hesi støð:“ broytt til: „Í tíðarskeiðinum 1. mai til 31. januar, báðir dagar íroknaðir, er vinnuligur fiskiskapur við línu ikki loyvdur, kalvalína, gággulína og hemaraveiða undantikin, innan fyri linjur drignar millum hesi støð:“

3) Aftaná § 4 verður sett:
**„§ 4 a.** Vinnuligur fiskiskapur er ikki loyvdur innan fyri linjur drignar millum hesi støð:

1) 62°04´000 N 08°03´000 V
2) 62°00´000 N 07°38´000 V
3) 62°04´500 N 07°43´500 V
4) 62°05´500 N 07°44´776 V
5) 62°06´300 N 07°44´500 V
6) 62°06´899 N 07°43´787 V
7) 62°08´350 N 07°39´500 V
8) 62°12´898 N 07°34´938 V
9) 62°19´300 N 07°49´000 V
10) 62°19´300 N 08°03´000 V
11) 62°04´000 N 08°03´000 V“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 26. september 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 132 26. september 2011

## Kunngerð um broyting í kunngerð um áseting av fiskiorku og mannagongd, tá veiðiloyvi verða flutt millum fiskifør 15 tons og størri

### § 1

Í kunngerð nr. 75 frá 13. juni 2006 um áseting av fiskiorku og mannagongd, tá veiðiloyvi verða flutt millum fiskifør 15 tons og størri, verður § 9, stk. 1, nr. 1 orðað soleiðis:

1) „Fyri fiskifør, ið royna við húki:

Longd (L) x breidd (B) x dýpi (D), tó undantikið fiskifør í høvuðsbólki 3, sbrt. § 28, stk. 1 í lógini.“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 26. september 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 133 26. september 2011

## Kunngerð um broyting í kunngerð um umbýti av fiskidøgum millum innaru og ytru fiskidagaleiðirnar

### § 1

Í kunngerð nr. 2 frá 12. januar 2011 um umbýti av fiskidøgum millum innaru og ytru fiskidagaleiðirnar verður í § 1 „1, “ strikað.

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 26. september 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um avhending av fiskidøgum

### § 1

Í kunngerð nr. 3 frá 12. januar 2011 um avhending av fiskidøgum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 1 verður „1, " strikað.

2) Í § 3, stk. 2 verður orðingin „ávikavist høvuðsbólki 1 og " strikað.

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 26. september 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705